LANDSVERK
byggir land

# Vegleiðing um valplakatir við landsveg

Tórshavn, 12. januar 2015
Journalnr. 14/00891-10

Endamálið við hesi vegleiðing er at tryggja ferðsluna á landsvegi og samstundis tryggja møguleikan at seta upp valplakatir í sambandi við val.
Við uppseting av valplakatum við landsveg krevst ikki serstakt loyvi, um ásetingarnar í hesi vegleiðing verða fylgdar.

**Valplakatin**

- Valplakatin skal verða límað á eina veðurdygga plátu, sum ikki er størri enn 0,8 $m^2$.
- Valplakatin má ikki innihalda reflekterandi tilfar ella vera upplýst við sjálvstøðugari ljóskeldu
- Valplakatin má ikki bera bráð av ferðsluskelti

**Nær kunnu valplakatir uppsetast ?**

- Valplakatir kunnu heingjast upp í sambandi við løgtings- og fólkatingsval, kommunuval, fólkaatkvøður og onnur val, ið hildin verða á almannarættarligum grundarlagi.
- Valplakatir kunnu heingjast upp í tíðini frá fjórða leygardegnum undan valdegnum til 4 dagar eftir valið.

**Hvar kunna valplakatir uppsetast ?**

- Valplakatir kunnu heingjast upp á vegljósasteyrar og á útbúnað, ið trygt er festur í jørðina, og hevur til endamáls at sýna fram valplakatir.
-

**Hvar kunnu valplakatir ikki setast?**

- Við landsveg, har ferðmarkið er hægri enn 60 km/t.
- á sama útbúnað, sum góðkendur er ferðslumerking, herundir ferðsluskelti, vegvísingarskelti ella líknandi vegaútbúnað,
- í miðøkinum á rundkoyringum og á ferðsluoyggjum
- nærri enn 0,5 m frá vegjaðara ella 0,3 m frá súkklubreytajaðara, mált frá nærmasta kanti á valplakatini,
- lægri enn 2,3 m beinleiðis yvir eini gongu- ella súkklubreyt, mált frá niðasta kanti á valplakatini,
- á ein tílíkan hátt, at valplakatin kann hava við sær skaða á ljósmastrar, hegni o.l

Valplakat má ikki heingjast upp á ein tílíkan hátt, at tær fjala ta góðkendu vegamerkingina, órógva útsýnisviðurskiftini á vegnum ella annars eru til ampa fyri ferðslutrygdini.

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo

Valplakatin skal vísa navn, bústað og telefonnummar á tí persóni ella flokki, sum hevur uppheingingina um hendi.

Valplakat, sum eru hongd upp ímóti reglunum, skal takast niður aftur innan 12 tímar, eftir at vegamyndugleikin hevur kravt, at tær skulu takast niður.

Vegamyndugleikin kann taka valplakatir niður, sum ikki eru tiknar niður innan 12 tímar, eftir at vegamyndugleikin hevur boðað frá kravinum um at taka tær niður ella eru hongdar upp uttan fyri loyvdu tíðina. Vegamyndugleikin kann eisini taka niður valplakatir, sum eru hongdar upp ímóti reglunum í § 49, stk. 2 í ferðslulógini og sum ikki vísa tær kravdu kontaktupplýsingarnar á tí likamliga ella løgfrøðiliga persóninum, sum hevur havt uppheingingina um hendi.

Valplakatir, sum hava við sær ein beinleiðis og ítøkiligan vanda fyri ferðslutrygdina, kunnu beinanvegin takast niður av vegamyndugleikanum ella løgregluni. Vegamyndugleikin skal síðani seta seg í samband við tann, sum hevur havt uppheingingina um hendi og biðja viðkomandi um at koma eftir niðurtiknu valplakatini. Valplakatir, sum ikki eru avheintaðar í seinasta lagi 2 mánaðir eftir valdagin, kunnu síðani beinast burtur.

Útreiðslur hjá vegamyndugleikanum og løgregluni av at taka niður, varðveita og at gera aftur skaddar steyrar, hegn o.a. verður sum útgangsstøði goldið av tí, sum hevur havt uppheingingina um hendi.

Tórshavn hin x februar 2015

Landsverk Føroya Landfúti

Landsverk
Tinghúsvegur 5
P.O. Box 78
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 340 800
Fax +298 340 801
lv@lv.fo
www.landsverk.fo